

mynd: Símun Jóanesarson



*Danska Randi Laubek var allarhelst eisini var kendasta navnið á festivalinum*
*mynd: Petur W. Háberg*

FAKTA

## Skrá

**Hóskvøld 12. apríl kl. 20**
Dennis Mejdal (DK /vertur), myspace.com/dennismejdal
Angu (GL), myspace.com/angumotzfeldt
Høgni Lisberg (FO), myspace.com/hognilisberg
Pétur Ben (IS), myspace.com/peturben

**Fríggjakvøld 13. apríl kl. 20**
Dennis Mejdal (DK/vertur), myspace.com/dennismejdal
Randi Laubek (DK), myspace.com/randilaubek
Ólöf Arnalds (IS)
Tobias Trier (DK), myspace.com/ttrier
Guðrið Hansen (FO), myspace.com/gurihansen

**Leygarkvøld 14. apríl kl. 20**
Hanus og Aldubáran - (FO)

við nógvum dynamikki.

Pétur Ben endaði sína framførslu, og samstundis eisini fyrsta kvøldið av festivalinum, meðan hann stóð á einum stóli mitt ímillum áhoyrarafjøldina, hvaðani hann spældi sítt síðsta lag.

FRÍGGJAKVØLD:

# Tónlistarligt fjølbroytni

Meðan fyrsta kvøldið av Ljómandi Kuldabrúgv borðreiddi við einari heldur einsljóðandi skrá, við mannligum einstaklingum, sum sungu og spældu melodiskan singer/songwriter tónleik, so var fríggjakvøldið eitt kvøld merkt av tónlistarligum fjølbroytni.

## POPPUR EFTIR BÓKINI

Fyrst á palli var danska Randi Laubek, sum allarhelst eisini var kendasta navnið á festivalinum. Við sær hevði hon tveir tónleikarar, ein bassspælara og ein gittarist. Hesar báðar hevði hon tilvildarliga 'funnið' í barrini á einari ferju, ið sigldi millum Svøríki og Danmark, greiddi hon frá.

-De kunne mere end at drikke øl, fandt jeg sidenhen ud af, segði Randi, sum umfram at vera vøkur og sjarmerandi, eisini var stuttlig.

Hon spældi melodiøsan popp, sum bar brá av jassi og blús.

Støði var sera høgt, og bólkurin spældi sum ein eind. Tónleikurin var sera lurtaravinarligur. Men sjálvt um tónleikararnir næstan í hvørjum sangi skiftu ímillum ymisk ljóðføri og viðhvørt sungu bakrøddir, so var tónleikurin eitt sindur ov 'tryggur' til tíðir, um ein kann kalla tað tað. Spælt var eftir bókini og ikki so nógv út um tað. Men sum heild frálíkur tónleikur.

## KANSKA Í SO RÍKT

Ólöf Arnalds var næst á palli. Umframt ein klassiskan gittara hevði hon tvey onnur serlig streingjaljóðføri, har annað var gjørt úr beltisdýri. Saknaði ein eitt sindur av improvisatión og nýhugsan frá Randi Laubek, so kom tað í ríkt mát nú. Kanska í so ríkt. Onkur var hugtikin av hennara originaliteti og líkatil framførslu, men ikki hesin ummælarin.

Ólöf royndi at tosa danskt í byrjanini, men torført var at skilja, hvat hon segði. Tí frøddust allir partar, tá ið hon miðskeiðis í framførsluni skifti til enskt. Eitt sindur av Eivør og eitt sindur meiri av Kate Bush hoyrdust aftur í hennara sangi, tó uttan teirra dygdir. Framførslan var merkt av følskum sangi og nógvum mistøkum á gittaranum.

## GLITRANDI SORGBLÍDNI

Tá ið ein stuttur steðgur hevði verið, var Guðrið Hansen á skránni. Ílatin glitrandi, second-hand klæðir, sum so líðandi eru vorðin ein partur av hennara image, trein hon á pall. Hon greiddi frá, at hettar var hennara fyrsta framførsla í Danmark, og at hon gleddist um høvið.

Eftir at hava hoyrt eina framførslu, har tú meiri ella minni sat og krympaði tær, var tað sum eitt frískt lot at hoyra eina trygga og vælljóðandi Guðrið. Hon spældi kendar sangir sum "Postcard" og "Love is Dead" umframt nýtt tilfar. Sangirnir hjá Guðrið hava oftani tungar tekstir um lívsins skuggasíður og eru merktir av sorgblídni:

– Eg elski melankolskan tónleik. Og tað er ikki av tilvild, at næstan allir mínar sangir eru í mol, sigur hon og flennir.

– Men tað merkir als ikki, at tú absolutt skalt vera deprimerað. Melankolskur tónleikur gevur bara oftani eina realistiska mynd av tilveruni, haldi eg.

## FULLFÍGGJA UNDIRHALD

Danski Tobias Trier hevði fingið uppgávuna at enda fríggjakvøldið. Hann borðreiddi við stuttligastu og mest fullfíggjaðu framførsluni á øllum festivalinum. Hetta merkir tó ikki,